# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Hummaramálið ein skomm

Í fimm ár hava nakrir einstaklingar havt eitt sakarmál hangandi yvir høvdinum, tí teir ótu livandi hummara, sum tað verður gjørt summa staðni í Asia.

Um hetta kunnu fólk meina, hvat tey vilja, men nakað landsmál er tað ikki, at onkur etur ein hummara livandi.

Fyriuttan, at tað er forkasteligt, at borgarar skulu vera forfylgdir yvir smálutir á henda hátt í so langa tíð, so eiga vit eisini at hugsa um ressourcusspillið. Fimm samfull ár, har nógvir pengar og nógv tíð hjá ákæruvaldi og sakførarum eru farin til hetta mál.

Hví? Hvør hevur ábyrgdina?

Kann tað hugsast, at vit í okkara skipan hava fólk, sum ikki ómaka sær at hyggja út gjøgnum gluggan fyri at vita, hvar tey eru stødd í verðini? Er tað í tráð við føroyska lóg og fólkavilja at rættarsøkja fólk á henda hátt yvir bagatellir?

Vit kunnu bara staðfesta, at onkur hevur malið tað, sum í ringasta føri var ein stormur í einum vatnglasi, til eitt stórt alment mál, sum bara hevur kostað. Her eru eingir vinnarar.

Teir ákærdu persónarnir kunnu vera glaðir, tí at teir langt um leingi vóru reinsaðir, men lítið man vera at ivast í, at øll vildu helst verið slíkt mál fyriuttan. Umdømi okkara sum rættarsamfelag er so ikki batnað av hesum.

Nú kemur so spurningurin, hvørjar avleiðingarnar vera av hesum máli. Tað má sigast at vera sera vánalig dømikraft onkunstaðni í okkara skipan, tá eitt bagatellmál um nakrar hummarar kann vinda so nógv uppá seg, at tað tekur fumm ár og nógva tíð og kreftir at loysa. Harafturat er tað ein stór skomm fyri okkum sum civiliserað land, at borgarar skulu hanga í leysum lofti á henda hátt í áravís av einum slíkum bagatellmáli.

Um eingin avleiðing verður tikin onkunstaðni í almennu skipanini, so slíkt alment ressoursuspill ikki endurtekur seg, so kann fryktast fyri, at vit fyri framyvir koma at síggja fleiri mál av sama slag. Tað gagnar ikki nøkrum – heldur ikki djórunum.

**Sosialurin**

## Í hvørja ætt skulu tey ungu leita?

**BERGTÓRA HØGNADÓTTIR JOENSEN**



Ein nýggj EU rapport vísir, at ungdómsarbeiðsloysið í Europu er søguliga høgt. Serlig átøk og kreppupakkar verða gjørdir til tess at basa arbeiðsloysinum. Eisini í Føroyum er ungsdómsarbeiðsloysið fleirfaldað seinasta árið.

Helst eru fleiri ung arbeiðsleys enn hagtølini siga. Nevniliga tey millum 15 og 18 ár og eldri sum foreldrini forsyrgja og tey ungu tískil ikki eru skrásett. Talan kann vera um ung, sum eru givin í framhaldsdeild ella miðnámsskúla.

**Samgongan kúrr**

Í vetur hava Unga Tjóðveldið og tjóðveldi við pallborðsfundi og fyrispurningum varpað ljós á at ungdómsarbeiðsloysið má basast.

Miðlar og yrkisfeløg hava eisini víst á trupulleikan. Samgongan hevur tó verið púra kúrr í hesum álvarsmálið. Serliga trý ráð kunnu gera sítt til at bøta um støðuna. Almannamálaráðið, mentamálaraðið og vinnumálaráðið. Tykist marghýttligt, at tey als ongan hugburð ella ætlanir tykjast at hava í mun til ungdómsarbeiðsloysið. Samgongan er púra kúrr.

**Arbeiðssamleikin**

Vit vita, at arbeiðssamleikin hevur stóran týdning fyri at kalla øll og at sosialu førleikarnir mennast nógv, tá fólk eru á arbeiðsmarknaðinum. Eisini er greitt, at sjávsálitið og sjálvsmyndin dalar hjá fólki, um tey eru arbeiðsleys. Ikki minst hjá ungum fólki, sum hava fáar - um nakrar – arbeiðsroyndir. Tískil er serliga umráðandi, at tey ungu fáa røttu hjálpina at koma út á arbeiðsmarknaðin. Royndir vísa, at lættari er at fáa eitt starv, um ein er á arbeiðsmarknaðinum, enn um ein stendur uttanfyri arbeiðsmarknaðin.

**Hvat er at gera?**

Tjóðveldi hevur fleiri ítøkilig uppskot um, hvat skal til fyri at minka um ungdómsarbeiðsloysið – og arbeiðsloysið sum heild. Nøkur uppskot eru hesi:

- Ung skulu hava eitt starv at fara til fram til longu dagin eftir at tey eru skrásett. Talan kann vera um aktivering, ikki minst innan almanna – og heilsuøkið har hendur eru kærkomnar og tað er ein góður møguleiki hjá teim ungu at royna ymiskar starvsleiðir. Hetta kann eisini vera ein gongd leið hjá ungum menniskjum at finna út av, hvør útbúgvingarleiðin møguliga kundi verið. Vit vita, at tørvur fer at verða á nógv fleiri starvsfólkum á umsorganarøkinum framyvir. Hetta kundi verið ein háttur, har fólk fingu møguleikan at roynt seg. Kanska fleiri mannfólk, tá eisini fingu hug at útbúgva seg innan umsorganarøkið.
- Betri skeiðstilboð til ung sum fáa útgjald frá Almannastovuni. Hjálp at skriva umsóknir og CV. Kunning um, hvussu setanarsamrøður fara fram. Møguleika at hitta onnur ung í somu støðu til tess at stimbra og birta vón hvør hjá øðrum. Eitt veruligt netverk fyri ung. Tey sum fáa ALSútgjald hava nógv betri skeiðmøguleikar – umframt at tey hava arbeiðsroyndir.
- Útbúgving er vegurin fram. Tey ungu eiga at fáa holla kunning um útbúgvingarmøguleikar, umframt vitan um, hvussu týdningarmikil útbúgving er, bæði í mun til at fáa starv og eina góða løn. Sum er eru 80 % av teimum sum eru arbeiðsleys ófaklærd.
- Virkispraktikkir. Ein háttur hjá teim ungu at sleppa at 'snodda' eitt sindur til ymisk arbeiðsøki.
- Møguleikar til ung við skerdum førleika. Sum er sleppur bert helvtin av umsøkjarunum inn á Dugni skúlan – ella fyrrverandi Alvskúlan, sum er einasta tilboðið í Føroyum til teirra sum vegna fysiskar, psykiskar ella sosialar orsøkir ikki megna vanligu skúlatilboðini.
- Fleksiblar miðnámsútbúgvingar. Til ber hjá elituítrottarfólki at taka miðnámsskúla yvir longri tíð enn vanligt. Tað sama átti at verið galdandi hjá teimum sum hava sjúku, brek ella sosial viðurskifti sum gera at neyðugt kann vera at taka miðnám yvir eitt longri áramál. Talan kann vera um stakar uppihaldarar.
- Mentorskipanir. Hin ungi kann styrkja arbeiðssamleikan eitt nú við at hava ein mentor. Ein persónur sum kann eggja, lurta, vegleiða og geva viðkomandi áræði til eina starvsleið.
- Starvsfólk sum burturav fæst við at fáa ung fólk út á arbeiðsmarknaðin. Hesi kundu hjálpt serliga teimum ungu, tá hesin bólkurin er serliga viðbrekin, tí hann ofta ongar royndir hevur.
- Starvsfólk rímiliga málsnøgd. Um málsviðgerðarnir sum nú, hava fleiri 100-tals mál er sjálvsagt, at arbeiðið verður hareftir. Sum er, er ikki gjørligt at hava neyðugu og munagóðu uppfylgingina, so talan verður um eitt optimalt og effektivt jobmatch.
- Tað almenna eigur at ganga á odda. Almenni sektorurin eigur at vera ein fyrimynd í mun til at hava lærlingar, næmingar og eisini at fáa ung fólk í aktivering og til setanarsamrøður.

Nøkur uppskot eru til teirra, sum hava arbeiðsloysið sum trupulleika burturav, meðan onnur uppskot eru ætlað teimum, sum hava avbjóðingar umframt arbeiðsloysið.

**Konkretar verkætlanir**

Farast kann undir nakrar aktiveringsverkætlanir beinanvegin. Eitt nú eina verkætlan at hjálpa til hjá nýklaktum trí – ella tvíburarfamiljum. Í barnagørðum, á røktarheimum. Sjálvsagt, má tað á ongan hátt ávirka normeringarnar á arbeiðsplássinum.

Eisini má kannast, um tað kundi verið ein gongd leið at tey virki, sum fáa lut í stóru almennu verkætlanunum sum taka drúgva tíð binda seg til at taka ímóti lærlingum. Talan kann vera um eitt nú timburmenn, elektrikarar eitt nú til verkætlanir sum Skúladepilin í Marknagili, um -og nýbygging á landssjúkrahúsinum, nýggj røktarheim og so framvegis.

Men hvat sigur samgongan? Hvussu leingi ætlar hon at vera kúrr?


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.